# Kjak



**Zacharias Bech**
*Porkeri*

## Blokkstuðulin fíggjar Havnina

*Jákup Símun Simonsen - ein av lærhvølpunum hjá Høgna Hoydal havi eg latið mær fortalt – hevði fyri nakað síðani eina grein í bløðunum, har hann fer harðliga fram ímóti Sambandsflokkinum*

Hesin verður lagdur undir at hava »slept øllum búskaparligum- og fíggjarligum amboðum fyri borð. Eingin fíggjarstýring og ein ovurnýtsla fyri læntan pening, sum sjáldan áður er sædd her á landi«.

Jákup Símun Simonsen nevnir av góðum grundum ikki ovurnýtsluna fyri læntan pening, sum ongantíð er sædd her á landi, tá Tjóðveldisflokkurin umsat fíggjarmál frá 1985 til 1989.

Í greinini nevnir hann tríggjar politikarar hjá Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen, Johan Dahl og Edmund Joensen.

Hví hann nevnir hesar tríggjar, er ilt at vita, men millum reglurnar haldi eg meg kenna ein farra av øvund. Øvund yvir, at hann metir, at teir í Tjóðveldinum ikki eiga politikarar av slíkum formati, sum hesar tríggjar frammanfyri nevndu.

Hví hann bara nevnir Sambandsflokkin, tá hesin er í samgongu við tveir aðrar flokkar, kann ein bara gita um.

Er tað tí, at Sambandsflokkurin, sum tann einasti av teimum politisku flokkunum heldur fast um ríkisfelagsskapin, sum ger, at vit í Føroyum kunnu hava sama livistøði sum hini norðurlondini? Hetta ger, at tað er ikki neyðugt hjá tjóðveldisfólki eins og nógvum øðrum at rýma úr Føroyum til Danmark av fíggjarligum orsøkum.

Í greinini verður sagt, at ta tíðina, Tjóðveldi sat í landsstýrinum og umsat fíggjarmál, vóru uppspardar milliardir á bók.

Rætt er tað, at teir spardu upp. Men teir eisini viðurkenna, at tað var danskur blokkur, teir spardu upp. Tá blokkurin var skorin, var eingin uppsparing meir.

Tjóðveldi eigur eisini at viðurkenna, at teir í sínari tíð tóku við eftir eitt landsstýri undir sambandsleiðslu, sum hevði ført føroyska samfelagið burturúr einari álvarsligari kreppu, orsaka av húsaganginum, sum táverandi Tjóðveldisflokkurin átti sín stóra leiklut í. Teir komu til eitt vælkoyrandi samfelag.

Tá teir 6 ár seinni løgdu frá sær, høvdu teir minkað um inntøkurnar við útvið 400 mió. kr. og økt um landskassans útreiðslur við 1 mia. kr.

Um Jákup Símun Simonsen metir hetta sum góða fíggjarstýring, so fái eg tað ikki at passa saman við ta meting, eg sum vanligur húshaldari havi av hesum orði.

Tí eitt og hvørt húsarhald, við virðing fyri sær sjálvum, vil altíð royna at økja um sínar inntøkur og minka um sínar útreiðslur í mun til tað, tey halda vera neyðugt.

Til greinina verður Jákup Símun Simonsen nevndur sum býráðslimur. Hann veit og átti at viðurkent, at ein fittur partur av tí peningi, ið hann umsitur í Tórshavnar kommunu, stavar frá blokkstuðlinum og donskum lønum, sum fella niður í hesi kommunu, og sum verður brúktur til at gera gott við millum borgararnar.

Uttan henda pening vildi eg mett, at Tórshavnar kommuna hevði verið ikki so fáar túsund borgarar fátækari, enn hon er nú.

Henda afturvendandi frasan frá tjóðveldisfólki um, at Sambandsflokkurin trúttar niður í fólk, at vit duga einki og kunnu einki sjálvi, er eftirhondini so útvatnað, at tað er ikki vert at gera viðmerkingar til.

Tað sær út til, at hon verður brúkt av berari ómegd.

---



**Bjørn Kalsø**
*løgtingsmaður*

## Vinnunevndarformaður leyp frá egnum áliti

*Tá fiskidagarnir vóru til viðgerðar í Løgtinginum, leyp vinnunevndarformaðurin, Katrin Dahl Jacobsen frá egnum áliti, tá hon atkvøddi fyri broytingaruppskoti, sum formaðurin í mentunarnevndini, Magni Laksafoss stóð á odda fyri. Slíkt man neyvan fyrr vera sætt í føroyskari fiskivinnusøgu*

### Samgongumeirilutin hevði gjørt semju

Undir viðgerðini í Vinnunevndini um fiskidagar, hevði samgongumeirilutin: eg sjálvur, Heðin Zakariassen, Bjarni Djurholm og Mikkjal Sørensen, saman við formanninum í nevndini, Katrini Dahl Jacobsen, gjørt avtalu um og skriva undir álit, sum legði upp til at skipa fiskiskapin hjá stóru lemmatrolarunum undir fiskidagaskipanini, at skerja fiskidagatalið hjá partrolarum og línubátum við 3 prosentum, umframt at taka 4000 dagar út úr skipanini í bólki 5.

Við aðru viðgerð varð álitið hjá meirilutanum samtykt. Uppskotini frá Tjóðveldi og Miðflokkinum um ógvusligar skerjingar í fiskidøgum vórðu samstundis feld.

### Formaðurin í mentunarnevndini gjørdi bart

Við triðju viðgerð gjørdi "sambands- og samgongumaðurin" formaðurin í mentunarnevndini, Magni Laksafoss kortini bart. Saman við samgongumonnunum, John Johannesen, Hans Paula Strøm og Edmundi Joensen, stórum parti av Tjóðveldi og Miðflokkinum, legði formaður mentunarnevndarinnar broytingaruppskot fram, sum legði upp til nógv størri skerjingar í fiskidagatali enn framlagda meirilutaálitið.

### Vinnunevndarformaðurin atkvøddi fyri broytingaruppskotinum

Hóast vinnunevndarformaðurin undir orðaskiftinum við triðju viðgerð vissaði sínar samstarvspartar um, at hon fór at halda fast við ta semju, hon hevði gjørt í nevndini, so leyp hon frá kortni. Tá atkvøðast skuldi, atkvøddi vinnunevndarformaðurin fyri broytingaruppskotinum frá formanninum í mentunarnevndini.

Hugsi at hetta man verða fyrstu ferð í føroyskari fiskivinnusøgu, at slíkur glantrileikur hevur tikið seg upp í samband við viðgerðina av fiskidøgum á Løgtingi.

### Ilt at meta um samstarvsevnini frameftir

Fleiri stórmál eru framvegis óloyst, sum samgongan hevur sett sær fyri at loysa. Onkur av hesum málum skulu viðgerast í vinnunevndini. Andstøðan hevur somuleiðis stórmál liggjandi í nevndini, sum skulu viðgerðast.

Spurningurin er bara, hvussu tað man fara at gangast samgongumeirilutanum at samstarva í nevndini frameftir, nú vit í stórmáli hava upplivað ein nevndarformann, sum tosar í eyst og handlar í vest.

Livst so spyrst!